# Kommunuskrivstovan verður kanska kunningarstova

Nú Leirvík og Gøta hava lagt saman í eina kommunu, er gjørt av, at umsitingin skal vera í Gøtu. Men tað hevur so reist spurningin um, hvat kommunuskrivstovan í Leirvík so skal brúkast til. Eisini í bygdaráðnum hevur hesin spurningurin verið til umrøðu. Eitt, sum nógv hevur verið tosað um, er at gera kommunuskrivstovuna til kunningarstovu og til onnur endamál, sum hava við ferðavinnu og frítíðarvinnu at gera. Í hesum sambandi hava tey kannað eftir, hvussu ferðavinnutiltøk og kunningarstovur eru skipað aðrastaðni, men enn er ongin avgerð tikin.



# Topaz: Fakfeløg gjørdu sína ávirkan galdandi hjá LÍV

**- Sum fakfelag kunnu vit ikki vera við til at okkara peningur verður brúktur fíggja virksemi, har starvsfólk ikki fær sína løn, sigur forkvinnan í Starvsmannafelagnum. Tí hava fakfeløgini, sum eiga peningin í LÍV, fortalt tryggingarfelagnum, at tað er ógvuliga umráðandi, at manningin á Topaz fekk sína løn**

ÍLØGUR OG ETIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Sum fakfeløg kunnu vit ikki í tøgn vera vitni til, at okkara peningur verður brúktur at fíggja virksemi, har starvsfólk ikki fær sína løn.

Tað sigur Selma Ellingsgaard, forkvinna í Starvsmannafelagnum.

Tey fýra fakfeløgini, Starvsmannafelagið, Lærarafelagið, Pedagogfelagið og Havnar Arbeiðskvinnufelag, hava øll sínar tryggingar hjá LÍV.

Og teimum fýra feløgunum hevur tað ligið ógvuliga nær á hjartað, at manningin á føroyska skipinum, Topaz, fekk sína løn skjótast tilbar.

Tryggingarfelagið LÍV hevur verið við til at fíggja virksemið hjá Topaz.

Og hesi fýra fakfeløgini hava tilsamans einar 5000 limir í almennum starvi, ið hava sína eftirlønaruppsparingar og lívstryggingar í tryggingarfelagnum LÍV.

- Sostatt eru vit ein stórur partur av fíggjarliga grundarlagnum undir LÍV saman við leiðslu og umsitingini í Lív, hava vit eisini herfyri stuðlað undir at etiskar reglar og mannagongdir vórðu ásettar fyri, hvat okkara peningur verður brúktur til og, hvat slag av virksemi, okkara peningur er við til at fíggja.

### Hugsa ikki bara um vinning

- Sum fakfeløg kunnu vit ikki loyva okkum bara at hugsa um vinning, tí vit mugu og skulu hava tey menniskjaligu virðini við, eisini tá íløgur verða gjørdar.



*Álitið á LÍV er ikki skalað av hesi hendingini, sigur Selma Ellingsgaard, forkvinna í Starvsmannafelagnum*

Selma Ellingsgaard sigur, at tí avgjørdu fakfeløgini herfyri at biðja LÍV um fund, at fáa gjølliga kunning og fyri at gera sína ávirkan galdandi hjá nevndini og leiðsluni í LíV, nú málið um Topaz kom í ljósmála.

- Har hava vit lýst okkara sjónarmið og lagt áherðslu á, hvussu týdningarmikið tað er fyri okkum sum fakfeløg, at tryggja okkum at manningin á Topaz fær sína løn. Okkara aðalmál eru at tryggja limum okkara virðilig og sømulig arbeiðskor og løn, og tí var tað sjálvsagt ein stórur skelkur fyri okkum og solidaritetsandan, at vita, at í starvsfólk hava sitið í mánaðir í Spania undir mannminkandi umstøðum og við ongari løn.

### Álitið ikki skalað

Selma Ellingsgaard sigur, at fundurin við LÍV var konstruktivur og at tryggingarfelagið veitti vissu fyri, at trupulleikin skuldi loysast.

- Vit hava havt eitt gott samskifti við LÍV um Topaz-málið og tað er umráðandi fyri okkum at álitið ímillum partarnar ikki er skalað og tað er tað ikki.

- LÍV greiddi okkum frá, at tey ikki vistu, hvussu støðan var, fyrrenn nú og at felagið reageraði so skjótt, tey frættu um trupulleikan.

- Vit fingu at vita frá tryggingarfelagnum, at eisini fyri tey var tað umráðandi at fáa trupulleikan loystan og tað hava vit onga sum helst orsøk at ivast í.

Selma Ellingsgaard staðfestir, at fakfeløgini hava framvegis fult álit á LÍV og at tey hava onga orsøk at halda, at LÍV hevur vitað um trupulleikan, fyrrenn júst nú.

Hon staðfestir eisini, at tað kom ongantíð har til, at feløgini løgdu trýst á LÍV, tí fundurin ímillum partarnar var í sátt og semju og partarnir vóru fult samdir um at málið skuldi loysast.

## Velja aftur ársins leirvíking í ár

**Bygdaráðið í Leirvík hevur nú tikið stig til at fáa tiltakið um at velja ársins leirvíking í eina fasta legu**

ÁRSINS RÓSA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í nøkur ár hava tey í Leirvík, valt ársins bygdarfólk og í hesum sambandi hava tey innstillað leirvíkingar, sum tey halda hava uppiborið eitt serligt herðaklapp, til ársins rósu.

Men hetta hevur verið eitt tiltak, sum privatfólk tóku stig til á sjálvboðnum grundarlagið í sambandi við at jólaskipið plaga at koma til Leirvíkar upp undir jól.

Hinvegin er hetta tiltakið blivið so væl umtókt, at ætlanin er ikki at hetta skal detta niður fyri aftur og tí ætlar bygdaráðið nú at gera hetta til eitt alment og formligt tiltak í bygdini at velja ársins rósu í Leirvík.

Í tí sambandi hevur bygdaráðið valt trý fólk í eina nevnd við trimum fólkum at skipa fyri tiltakinum.

Hendan nevndin skal eisini seta treytir fyri tiltakinum og gera eina innstilling til heiðurin.

Í nevndini sita Randal Nybo, sum hevur verið ein av fyriskiparunum, Ove Heinesen, skrivari í kommununi og Ólavur Sjúrðarberg, sum eisini er bygdaráðslimur og formaður í trivnaðarnevndini.

# Samgonguslitið bjargar tollfríu sigarettunum

**Politikarar í ABC flokkunum eru samdir um, at verður hetta samgongan, skal kunngerðin, sum bannar innflutningi at tollfríum tubakki, takast av**

TOLLFRÍ SØLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tey, sum hava barst við hond og fót ímóti ætlanini hjá Karsten Hansen um at banna innflutningi at tollfríum tubbaksvørum til Føroyar, kunnu bara seta sína vón til, at ætlaða ABC samgongan verður veruleiki.

Tí verður hon tað, er lítil ivi um, at kunngerðin, sum Karsten Hansen hevur lýst um at banna influtningi av tollfríum tubbaksvørum til Føroyar frá 1. oktober, verður avtikin.

So tað kann væl vera, at hendan ABC samgongan, sum nú er undir landi, eigur onkrar óvæntaðar vinir runt um í landinum, sum senda henni ein vinarligan tanka, um tað kanska ikki er av politiskum orsøkum.

Politikarar, sum samráðast um ABC samgonguna, siga fyri Portalinum, at teir hava sum so ikki viðgjørt hesa illa lýddu kunngerðina, men hon hevur verið nevnt og tað øll halda, at hon skal takast av.

So teir ivast ikki í, at verður ABC samgongan veruleiki og Karsten Hansen fær durafjórðingin í fíggjarmálaráðnum, verður eitt tað fyrsta tiltakið hjá nýggja landsstýrismanninum at avtaka kunngerðina, so at tollfrí søla av tubbaksvørum kann halda fram.

Politikarar duga ikki at síggja meiningina við kunngerðini og teir duga ikki at síggja nakað skilagott í at seta tiltøk í verk, sum gera umstøðurnar hjá vinnuni torførari enn tær longu eru.

Bæði ferðavinnan og Samvit hava funnist hvassliga at Karsteni Hansen fyri kunngerðina.

Sagt hevur verið, at Smyril Line og Atlantsflog fara at missa fitt av inntøku og at tey so verða noydd at hækka ferðaseðlar og onnur tænastugjøld fyri at vinna peningin innaftur.

Men Karsten Hansen hevur ikki verið til at vika, men noyðast hann at avlevera lykilin til fíggjarmálaráðið, stendur tað eftirmanni hansara frítt fyri at avtaka kunngerðina, áðrenn hon nakrantíð kemur í gildi og tað er alt sum týðir upp á tað.

